

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 11 - 2011

# Føroyskur oljumaður fegnast um framgongd hjá Lundin

Herfyri frættist, at svenska oljufelagið Lundin hevði gjørt risafund í Norðsjónum, og at millum leiðandi starvsfólkini har eisini var ein føroyingur, Tummas Pauli í Mýri úr Klaksvík. Hann kann nú eisini gleðast um seinastu roknskapartølini hjá ffelagnum. Tað gekk nevniliga munandi betur hjá tí svenska olju- og gassfelagnum Lundin Petroleum í triðja ársfjórðingi í ár enn í sama tíðarskeiði í fjør. Í ár var úrslitið 940 milliónir norskar krónur fyri skatt samanborið við 594 milliónir krónur í triðja ársfjórðingi í 2010. Rakstrarinntøkurnar í triðja ársfjórðingi 2011 vóru 1,85 milliard norskar krónur og rakstrarúrslitið 1,48 milliard krónur. Í triðja ársfjórðingi í fjør vóru tey tilsvarandi tølini 1,14 milliard og 943 milliónir norskar krónur. Framtíðin hjá tí svenska felagnum er hugalig, tí felagið hevur fingið ein part av teimum báðum stóru fundunum Aldous Major suður og Avaldsnes. Tummas Pauli í Mýri segði við oljan.fo, tá stóra Avaldsnesfundið varð gjørt fyrr í ár, at tað var hugaligt at arbeiða fyri eitt felag, sum hevur góðan byrð og eina spennandi framtíð. Í dag starvast hann í Oslo. Frammanundan varð hann á skrivstovuni hjá felagnum á evropeiska meginlandinum. Hann fegnast um framgongdina hjá felagnum.